tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Politiskir telvarar

## *Oddagrein*

Fólkaflokkurin hevur í samgongusamstarvinum fingið nógv av sínum prinsippmálum ígjøgnum, hóast teir bert eru næststørsti flokkur í samgonguni — seinast PF Vágatunnilin. Tjóðveldisflokkurin hevur alment kritiserað ætlanina, men hevur vent, tí fullveldismálið verður sett upp ímóti øllum øðrum. Hettar, at fullveldismálið verður sett upp ímóti gerandisdagsmálum er ein vansi, ið m.a. tjóðveldistingmaðurin úr Eysturoynni hevur víst á.

Fólkaflokkurin brúkar við øðrum orðum fullveldismálið til at fáa síni prinsippmál ígjøgnum. Hettar má sigast at vera ein rættiliga heppin støða fyri Fólkaflokkin. Teir fáa síni ting ígjøgnum aftur fyri fullveldismálið, ið so at siga er einasta fingramerki hjá Tjóðveldisflokkinum í hesari samgongu.

Um samgonguslit varð í dag, so er spurningurin, hvørji avrik Tjóðveldisflokkurin hevði havt at víst á. Longur teir slaka fyri Fólkaflokkinum í gerandisdagsmálum og málum, sum pensiónsskipanir o.a., meiri hava teir at missa, um samgongan slitnar áðrenn nakað fullveldi. Hettar er ein ónd ringrás, ið ikki gagnar føroyska vælferðarsamfelagnum, ið dagliga verður undirminerað av eini gongd, ið m.a. er stungin út í kortið av Caragata álitinum. Tjóðveldisflokkurin er argur inn á m.a. Javnaðarflokkin og ákærir flokkin fyri at taka sær einarætt upp á vælferðarsamfelagið. Rætt skal vera rætt, Tjóðveldisflokkurin hevur mangan verið ein góður stuðul hjá Javnaðarflokkinum í slíkum málum, m.a. tá Samhaldsfasti Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin varð stovnsettur. Tjóðveldisflokkurin hevur í hesari samgonguni fleiri høvi at prógva fyri veljarnum, at teir framvegis stuðla grundsjónarmiðnum um eitt samhaldsfast samfelag. Lunnar verða lagdir undir brúkaragjald í føroyska vegakervinum, meðan Tjóðveldið bert hyggur at og enntá tekur undir við hesum. Pensiónsskipanin verður umlagd til “hvør er sær sjálvum næstur” prinsippið, og hesum tekur Tjóðveldið eftir øllum at døma eisini undir við.

Fólkaflokkurin dugir eftir øllum at døma væl politiskt talv. Tað, at teir fáa síni mál ígjøgnum við at seta loysingina upp ímóti, er ikki eindømi. Hettar gjørdi Fólkaflokkurin eisini, tá Sambandsflokkurin hevði løgmann, men bert við øvugtum fortekni. Tá lovaði Fólkaflokkurin at lata vera við at tosa um loysing afturfyri at fáa síni prinsippmál ígjøgnum.

Løgið, at tað gongur enn einaferð, bert við øvugtum fortekni hesa ferðina. Tað má sigast at vera væl telvað hjá teimum.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Einaferð var tað.....



Ja, einaferð var tað ein skotti...... Nú er so skítfult til av teimum. Einaferð var tað ein revagarður.... ja, einaferð var tað eitt flakavirki. Einaferð var tað ein tunnil, og einaferð runnu áirnar á vestursíðuni á Funningsfirði eystureftir. Einaferð var tað ein oljuhavn..... vælsignaðu menn og brøður: Latið suðuroyðingar eiga oljuna: Teir eiga jú "Smirul" !!!!

Einaferð droymdi Fárao, at hann stóð við Nilánna og sá sjey feitar kýr koma upp úr ánni og leggjast at eta á áarbakkanum. Síðan sá hann sjey rakar kýr koma upp úr ánni og eta hinar sjey fyrru og vóru líka rak. Faroe vaknaði av dreyminum og sovnaði aftur. Ja, einaferð var tað ein kúgv........ og einaferð var tað ein føroyingur!!!!!!

**Frits Johannesen**
**Fuglafjørður**

# Stór útsøla!! Endabrestur- alt skal út!!

Tað var bæði at gráta og flenna at, tá ið vit fyrr í vikuni løgdu oyra til Fimmaran og sama kvøldið í Krosskasti ( fólkaflokskasti tað kvøldið ) við bæði eygum og oyrum fingu vitnisburð frá formanninum í størsta flokki ( í løtuni ), tá hann fyri øllum Føroya fólki viðgekk sína politisku ómegd. Ikki bara einaferð, men aftur og aftur. Tøvdi og tók upp í saman. Evnið var Vágatunnulin. Tragikomiskt, segði onkur niðri á Vaglinum dagin eftir. Hon var á veg á útsølu. Og í hesum útsølutíðum var ikki annað at hugsa enn, at handilsliga snildi hjá ávísum fólkafloksmonnum er teimum ein góð barlast í politisku telvingini. So góð, at eftir hesar sendingarnar stendur tjóðveldisflokkurin spillnakin og heldur fyri. Har er einki eftir!

### Kávalótir

Tí nakað hevur hann gramt seg fyri fjølmiðlunum, formaður Tjóðveldisfloksins Heini 0. Heinesen.( Tað er hann, sum er formaður). Formaðurin fyri flokkin við tí søguliga?? møguleikanum. Um tað, at Landsverkfrøðingurin varð sagdur úr starvi, um tað, at tryggja Landsverkfrøðinginum og føroyingum tunnilsarbeiðið o. s. v.

Hví gremur Heini 0. Heinesen seg ikki á rætta stað? Helst nú, teir eru farnir at hava samgongufundir? Hví ber ikki størsta samgonguflokki til á nakran hátt at seta síni fingramerki á tað, sum fer fram? Svarið fingu vit í Fimmaranum og hasum ”kastinum”. Politisk ómegd og einki annað!!!

### Hvør er man?

**”Man** hevur valt hasa loysnina við privatum partafelagi at taka sær av tunnilsarbeiðinum..

**Landsstýrismaðurin** hevur valt hasa loysnina. Tað man hann hava loyvi til. Ikki besti mátin. Tað er ein **umsitingarligu**r spurningur innast inni!!!! ( Er Heini ikki politikari)?

Hetta er ikki nøkur góð loysn. Ikki nøkur sparing. Nógn dýrari. Vegastrekkið kostar kanska einar 10. ferðir so nógv. Tá ið Phil og Søn komu til Føroyar, var eingin, sum kláraði at kappast við teir. Ikki gott at fremmandir koma inn. Men eg havi fingið tað í álitið, sum eg vildi hava.!!!“ Alt hetta bar formaðurin í størsta flokki, sum eisini er formaður í Vinnunevndini, fram fyri Føroya fólki.



### Ideologisk avgerð

Og hvat hevur so formaðurin fyri flokkin við søguliga møguleikanum fingið í álitið? Flokkurin, sum er størstur og hevur ”a second chance”, við tað at hann eigur formannin í Vinnunevndini? Jú, at Landsverkfrøðingurin skal hava eftirlit! Tað syrgdi Alfred Olsen fyri. Umboð Sambandsfloksins.

Eftir standa vit í Javnaðarflokkinum og eru tey einastu, sum hava eina turkatrúgv uppá, at føroyingar sjálvir klára at gera hetta arbeiðið. Annars var Landsverkfrøðingurin ikki farin undir tað í sínari tíð. Men nú er tað so endaliga tikið úr teirra hondum. At gera tunnil á landi ella undir sjógv, er ikki tann stóri munurin, helt landsverkfrøðingurin. Og higartil hevur borið væl til.

Men, sum Finnbogi Arge og Jógvan á Lakjuni vístu á, so er hetta ein ideologisk sannføring. Tað **skal** á privatar hendur.

### Spæl fyri gallarínum

Hví var so neyðugt at drála og roksa so, tá eingin ósemja var í samgonguni um málið? Tá Tjóðveldisflokkurin bara vildi hava navnið á Landsverkfrøðinginginum við so ella so? Hví skal privatiseringin hjá sitandi samgonguni ballast inn í kávalótir frá Tjóðveldisflokkinum? Hví skuldu vágafólk bíða eftir hesum gallaríspælinum, sum ikki ein gang var elegant?

Virkandi Landsverkfrøðingur tyktist at taka við tí, teir kundu fáa. Við eftirlitinum fáa teir nørt um sína vitan, heldur formaðurin í Vinnunevndini. Men eg má bara spyrja. Hvat skal tað til, at Landsverkfrøðingurin nørir um sína vitan, tá ið man ikki skoytir um at brúka hana?

### Frensur á línu

Tað skal sigast, at tað pínir meg at síggja fólk krúpa, hvør tað so er. Men við myndini, sum Óli Breckman í tinginum lýsti tað stríð og strev, teir høvdu av Tjóðveldisflokkinum, so skilji eg, at Heini 0. Heinesen krýpur. Tað var, sum at hava frens á línu, helt Óli. Eitt ræðuligt rumsterilsi, áðrenn gjørdar avtalur vóru hildnar. Hann sipaði til síðu 2 í samgonguskjalinum. Eg má hóast alt við samkenslu ynskja tjóðveldismonnum góðan byrð, nú Bjarni Djurholm er farin at troðkast eftir avtalaða skattapolitikkinum. Tjóðveldisflokkurin fæst tá helst fyri helvtina av útsøluprísinum, nú so langt er útliðið.

**Katrin Dahl Jakobsen**
**tingkvinna**
**Javnaðarfloksins**




# Tro Håb og troldom í Norðurlandahúsinum

Í sambandi við tiltakið William Heinisen 100 ár sýnir Norðurlandahúsið filmin, Tro, Håb og Troldom, í dag klokkan 16 - og tiltakið er ókeypis.


# Hjartans tøkk

fyri sýndan heiður á 85 ára føðingardegi mínum.

**Blíðar heilsanir**
**Anna Petersen, Vágur**




# Vit mugu tátta í

*Nýggjasta frágreiðingin frá Búskaparáðnum sigur, at neyðugt er at umhugsa at tátta í búskaparliga*

John Johannessen

– Nýggjastu tølini geva orsøk til álvarsliga at umhugsa at tátta í búskaparliga. Neyðugt er st fylgja væl við gongdini komandi tíðina, tí við verandi ferð á búskapinum, er vandi fyri, at fløskuhálsar gerast ein veruligur trupulleiki, og at inflatiónin fer at økjast.

Hetta er høvuðsniðurstøðan í nýggjastu frágreiðingini hjá Búskaparráðnum, nevniliga várfrágreiðingini fyri ár 2000.

Búkaparráðið hevur eisini gjørt nøkur tilmæli fyri búskaparpolitikkin fyri ár 2000. Ráðið vísir á, at fíggjarlógin fyri ár 2000 má haldast somuleiðis, sum tað vísir á nøkur strukturell tiltøk, sum í øllum førum eiga at fremjast. Stendur vøksturin í búskapinum við, mælir ráðið til, at tiltøkini verða framskundað.

Búskaparráðið heldur, at MVG-lóggávan eigur at endurskoðast fyri at taka burtur undantøkini frá lógini. Skatta- og avgjaldspolitikkurin eigur at verða broyttur, so hann ikki stuðlar arbeiðsmegi í at flyta av landinum í eini tíð, tá henda sama arbeiðsmegin vantar í Føroyum.

Búskaparráðið heldur eisini, at skattalættin hjá fiskimonnum eigur at verða avtikin samstundis, sum forboðið móti framleiðslu umborð á skipunum eigur at verða avtikið. Somuleiðis eigur framhaldandi at verða arbeitt víðari við at lækka rentustuðulin.

Almenni raksturin eigur, sambært Búskaparráðnum, at verða effektiviseraður, og møguliga eigur almenni raksturin at verða skerdur, fyri at geva pláss í búskapinum fyri privatum virksemi og bæði privatum og almennum íløgum.

Stendur vøksturin framvegis við, hevur Búskaparráðið enn fleiri tilmæli um skerpingar. Tá eiga almennu íløgurnar á byggiøkinum at verða toygdar og seinkaðar somuleiðis, sum skatta- og avgjaldshækkingar skulu innførast.

Men Ráðið mælir tó Landsstýrinum til at royna at sleppa undan at nýta tvey tey seinastu amboðini. Staðfestast kann eisini, at tilmælið um skatta- og avgjaldshækkingar stríðir ímóti samgonguskjalinum.



*Bjarni Olsen er formaður í Búskaparráðnum*

# Toskakvotan hækkað

*Nýggi fiskiveiðisáttmálin við Ísland er nærum óbroyttur. Føroyingar sleooa tó at veiða 50 tons meira av toski í ár*

John Johannessen

Fiskiveiðisamráðingarnar millum Ísland og Føroyar í Havn fyrradagin góvu sama úrslit, sum væntað. Sáttmálin fyri ár 2000 er nærum tann sami, sum tann fyri í fjør.

Partarnir viðgjørdu á fundinum føroyskan fiskiskap í íslendskum sjógvi og íslendskan fiskiskap í føroyskum sjógvi í farna ári og samráddust um framhaldandi fiskiveiðimøguleikar hjá føroyskum skipum eftir botnfiski í íslendskum sjógvi.

Fiskimálastýrið boðar í tíðindaskrivi frá, at partarnir í framhaldi av hesum samráddust um, at heildarkvotan í íslendskum sjógvi verður óbroytt við 5.600 tonsum í 2000. Av hesi heildarkvotu verður toskakvotan hækkað úr 1.150 tonsum upp í 1.200 tons.

Kalvakvotan, sum skal veiðast í tíðarskeiðnum frá 1. juni til 1. september í ár, verður 100 tons, meðan nøgdin av øðrum botnfiskasløgum verður óbroytt.



### Avtalan um uppisjóvarfisk heldur fram

Fiskimálastýrið boðar frá, at verandi avtala um uppisjóvarfisk heldur fram. Íslendsk skip kunnu soleiðis veiða svartkjaft, 2000 tons av heystgýtandi sild og 1.300 tons av makreli í føroyskum sjógvi, meðan føroysk skip kunnu veiða svartkjaft og lodnu í Íslendskum sjógvi.

Føroysk skip kunnu nú eisini fiska sína lodnukvotu í grønlendskum sjógvi á 10.000 tons í íslendskum sjógvi.

Partarnir samdust um somu lodnuavtalu, sum fyri 1999. Føroysk skip kunnu í tíðarskeiðnum frá 1. juli 2000 til 30. apríl 2.002 veiða 30.000 tons við fyrivarni um broytingar í MLV virðinum.

### Styrkja samstarvið

Fiskimálaráðharrarnir vóru samdir um at styrkja tað vísundaliga samstarvið, sum er millum Ísland og Føroyar.

Jørgen Niclaseg og Árni M. Mathiesen viðgjørdu sjónarmið um fiskivinnuumsiting, fiskivinnu á sjógvi og landi og samstarv í ymiskum millumlandafelagsskapum. Serligur dentur verður lagdur á samstarvið í NAFO, NEAFC pg NAMMCO.

Partarnir umrøddu í hesum sambandi eisini hvalaveiðimál, og vóðru samdir um at víðka samstarvið á hesum øki.

Innan tunfiskiskapin viðgjørdu partarnir samstarvið innan ICCAT, og semja er um at loyva royndarveiðu inni hjá hvørjum øðrum við einum skipi í ár.





*Føroyski og íslendski fiskimálaráðharrin, Jørgin Noclasen og Árni M. Mathiesen*


# Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo



